*Framhald av síðu 2*

kristna kirkjan sjálvsagt kann síggjast og finnast, hon hevur nevniliga nøkur sjónlig eyðkenni, hinvegin er hon tó ósjónlig, tí at sjálvt um eyðkennini eru har, so er tað í síðsta enda bara Guð, ið veit, hvør ið hoyrir til hesa kirkjuna. Í síðsta enda er tað bara hann, sum kann gjøgnumskoða allar falslótir og alt hykl. Og hvar tað eru menniskju, er tað eisini kávalæti og hykl.

Kirkja Guðs er ein. Soleiðis er tað. Íðan, finnast tað ikki ymisk kirkjusamfeløg? Jú, tað gerast tað. Tað skyldast bæði synd menniskjans og einum neyðugum stríði, sum ikki gevur upp, fyri at halda seg til Hina heilagu Skrift og harvið standa í sannleikanum. Kristin skulu vera eins, tá ið tað ræður um læruna (dogmatikkina og etikkina), tí at sum Guð er ein, soleiðis er tað bara ein røtt gudgivin kristin læra. Tí er tað ein burturkáman av sjálvari tí kristnu játtanini, tá ið sagt verður, at vit skulu vera eitt, men ikki eins í læruni. Avbjóðingin til tey kristnu samfeløgini er ikki at góðtaka ta útbreiddu sannleikarelativismuna, men at gera sum brøðurnir í Berøa, nevniliga at rannsaka Skriftirnar fyri at síggja, um tað er soleiðis, sum boðað og lært verður (Áps. 17,10 ff). Hin kristna boðanin er nevniliga ikki eitt boð um, hvat ið kann vera sannleiki, men ein boðan av Sannleikanum (við stórum S). Hvørki meira ella minni.

*Anker Jørgensen er sera áhugaður í kirkjubygningum, og fekk frágreiðing um Viðareiðis Kirkju og hendingar, sum knýttar eru at henni*
*Mynd: Edvard Joensen*





*Á Tekniska Skúla í Klaksvík var eisini høvi at práta við fólk, sum komin vóru at lurta eftir fyrilestrinum hjá fyrrverandi forsætisráðharranum*
*Mynd: Edvard Joensen*

# Solidaritetur er kærleiki

Solidaritetur er eitt orð, sum fleiri ikki vilja brúka, tí tað minnir ov nógv um gamalt floksstríð. Men solidaritetur merkir kærleiki, sigur fyrrverandi danski forsætisráðharrin, Anker Jørgensen, sum nýliga hevur vitjað í Føroyum.

**VITJAN**
*Edvard Joensen*

Solidaritetur er tað sama sum kærleiki. Ikki kærleiki millum tvey ávís menniskju, men kærleiki manna millum yvirhøvur, sigur gamli fakfelagsmaðurin og fyrrverandi danski forsætisráðharrin, Anker Jørgensen.

Anker Jørgensen, sum hevur verið á privatari vitjan í Føroyum fyri stuttum, hevur ferðast kring oyggjarnar, har hann hevur hildið fyrilestrar og hitt fólk.

Hann sigur, at tá vit í dag koma inn á fakfelagstríð og orð sum solidaritet og floksstríð - klassakamp - eru nógv, sum beinanveg halda seg undan og líkasum ikki vilja kennast við hesi orðini.

–Tað er ikki uppi í tíðini, sum sagt verður, og verður roknað sum farið av móta. Men tað fer ongantíð av móta, sigur hann, og vísir til, at í slíkum støðum er tað, hann plagar at siga, at solidaritetur er tað sama sum kærleiki.

–Tí tað er ikki annað enn vanligur næstrakærleiki at stríðast saman við og fyri øðrum og rættindum teirra, sigur gamli, danski fakfelagsleiðarin.

Anker Jørgensen sigur, at tá hann so fer at tosa um kærleika, fáa fólk beinanveg annan hugburð til tað, tosað verður um, og hann merkir, at áhugin fyri tí, ið sagt verður, veksur.

–Men soleiðis broytist alt. Tá eg var ungur og virkin í fakfelagsrørsluni tosaðu vit um solaridaritet og floksstríð sum tað mest natúrliga av verðini, Og vit vóru erin av tí. Men í dag venda fólk sær meira enn so burtur, tá hetta verður borið upp á mál, sigur hann.

**Fylgir við**

Hóast tað eru nógv ár, síðan Anker Jørgensen gavt í politikki, fylgir hann kortini við, sum vera man. Eisini í føroyskum viðurskiftum. Og hann er forvitin og spyr og vil vita, hvat og hvussu tað røringin er í føroyskum politikki.

Men hann vil ikki gera nakrar almennar viðmerkingar til politisku støðuna kortini. Hann vísir á, at tað eru onnur, sum nú hava ta uppgávuna, og hana fer hann ikki at blanda seg uppí.

Tó dylur hann ikki fyri, at tað, sum nú hendir víða í Europa, har eitt víðgongt høgrarák tykist fara um londini, ikki hóvar honum.

Hann metir tað skaðiligt, men samstundis heldur og vónar hann, at tað er eitt framviðfarandi fyribrigdi, sum ikki fer at halda so leingi.

Tí væntandi er, at alt frá vinstraveinginujm til út á meira hóliga høgraveingin fara fólk at seta seg upp í móti hesum ráki, sum vit sóu tað í Fraklandi, tá annað umfar av forsetavalinum varð hildið.

**Mentamaður**

Anker Jørgensen er mentanarhugaður maður, og bæði bókmentir og myndlist metir hann høgt. Eitt annað, sum liggur frammalaga í sinninum hjá tí skjótt 80 ára gamla fyrrverandi politikaranum, er kirkjubygging. Hann fer ikki fram við eini kirkju, uttan at vilja vita okkurt um hana, og helst, um til ber, at sleppa inn at hyggja at henni.

Soleiðis var eisini hendan leygardagin, tá hann vitjaði á Viðareiði og í Klaksvík. Hóast ferðaætlanin var heldur knøpp, varð vitjað í Viðareiðis Kirkju, áðrenn farið varð til Klaksvíkar, har Anker Jørgensen helt fyrilestur fyri pensionistum og øðrum góðum fólki á Tekniska Skúla.

Feðralagið, sum vitjaði í Norðoyggjum kom við Dúguni um middagleitið og fór beinleiðis til Viðareiðis, har nevndin í Norðoya Javnaðarfelag tók í móti gestunum og beyð døgurða á Hotel Norð. Steiktan lunda við og heimagjørdan ís, sum avgjørt gagnaðist gestunum væl.

Eftir døgurðan varð farið oman í kirkjuna, har Olevinus Sørensen, deknur, greiddi frá kirkjuni og søgu hennara.

Serliga áhugaður var Anker Jørgensen í silvurinum sum latið varð kirkjuni av bretsku ríkisstjórnini sum tøkk fyri hjálpsemi og gestablídni, tá viðingar bjargaðu manningin á Marwood, sum fór á land eystantil á oynni í 1847.

Í kirkjuni er bóklingur, sum sigur frá millum øðrum hesi søguni, sum deknurin greiddi frá.

Um hesa hendingina varð yrkt ein vísa, sum er prentað í øðrum bindi av »Havið og vit« hjá J. Símun Hansen.

Hesi vísuni gjørdist Anker Jørgensen so hugtikin av, at hann fegin vildi fáa hana við sær, og tað fekk hann.

Eftir vitjanina á Viðareiði fór fylgið til Klasvíkar, har Anker Jørgensen helt fyrilestur og prátaði við fólk, sum komin vóru á Tekniska skúla at lurta eftir honum og fáa eitt prát aftaná fyrilesturin.


# ítróttur

Nr. 102 • leygardagur • 1. juni 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


## Dystir um vikuskiftið

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 02.06 | KÍ-EB/S | Suni Johansen |
| 02.06 | GÍ-TB | Eiler Rasmussen |
| 02.06 | B36-B68 | Dagfinn Olsen |
| 02.06 | VB-HB | Niklas á Líðarenda |
| 02.06 | NSÍ-Skála | Lassin Isaksen |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 01.06 | ÍF-B71 | Regin Egholm |
| 01.06 | VB-B36 | Tummas Pauli Olsen |
| 01.06 | KÍ-Sumba | Dia Lamhauge |
| 01.06 | HB-LÍF | Hans F. Hansen |
| 01.06 | FSV-NSÍ | Rúni Gaardbo |

**3. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 02.06 | AB-FSV | Johann Krogh |
| 02.06 | YB-B36 | Dia Lamhauge |
| 02.06 | B68-B71 | Laurits í Króki |
| 02.06 | HB-GÍ | Jonhard Hansen |
| 02.06 | Royn-ÍF | Jónleif Gerðisá |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 02.05 | GÍ-B36 | Eyðbjørn Andreasen |
| 02.05 | KÍ-B68 | Jan Eskild Glyvradal |

**HM í fótbólti**

| | |
|---|---|
| 01.06 | Írland-Cameroon |
| 01.06 | Uruguay-Danmark |
| 01.06 | Týskland-Saudi Arabia |
| 02.06 | Ongland-Svøríki |
| 02.06 | Paraguay-Suður Afrika |
| 02.06 | Argentina-Nigeria |
| 02.06 | Spania-Slovenia |
| 03.06 | Kroatia-Mexico |
| 03.06 | Brasilia-Turkaland |
| 03.06 | Italia-Ecuador |

# Klaksvíkin stendur til at bresta



*Fleiri manningar enn nakrantíð taka lut í fyrstu FM stevnuni, sum verður í Klaksvík um vikuskiftið*

**Áhugin fyri kappróðrinum hevur ongantíð verið so stórur, sum hann er undan Norðoyarstevnuni hesa ferð**

**KAPPRÓÐUR**
*Jóannes Hansen*

Kappróðurin í Klaksvík ríður á aldukambinum í løtuni. Klaksvíkingar hava fingið um endan aftur í kappróðrinum, og tað sást aftur á fleiri økjum. Fleiri manningar enn nakrantíð taka lut í fyrstu FM stevnuni, sum er í heimasjógvi hjá Klaksvíkar Róðrarfelag, og teir, sum rógva, og tey í nevndini hjá róðrarfelagnum fáa so at siga ikki víst seg í býnum, uttan at tað verður spurt og tosað um kappróður, og um hvussu vánirnar nú eru fyri róðrarárinum og serliga Norðoyarstevnuni.

Kristian Eli Zachariasen er formaður í róðrarfelagnum í Klaksvík. Hann rør ikki sjálvur, men hann er nógv í neytsinum, og saman við øðrum leggur hann nógva tíð og orku í, at umstøðurnar hjá teimum, sum rógva, og hjá teimum, sum fylgja við, skulu vera so góðar, sum tað á nakran hátt ber til. Sum tað var frammi fyrr í vikuni, so hava hann og onkrir aðrir nevndarlimir smíðað ein nýggjan drátt. Hesin er ætlaður at draga bátarnar eftir, tá teir koma at landi aftur eftir loknan róður og skulu reinsast orsaka av ILA sjúkuni.

**Keypt Norðlýsið**

Kristian Eli Zachariasen heldur tað vera sera hugaligt, at vanligi klaksvíkingurin nú er so áhugaður í róðrarfelagnum og kappróðrinum:

– Norðlýsið plagar at skriva nógv um fótbólt. Í fjør skrivaðu teir nógv um kappróður, og tað líkaði okkum í felagnum væl. Nú undan fyrstu kappingini gjørdu teir aftur rǽttuliga fitt burturúr. Tað hevur fingið onkran at glósa okkum og spyrja, um vit hava keypt Norðlýsið, men sjálvandi er hetta bara skemt, sum boðar frá, at skrivingin um kappróður er væl dámd her norðuri, heldur formaðurin í Klaksvíkar Róðrarfelag.

Sæst áhugin fyri róðrinum aftur á øðrum økjum eisini?

– So avgjørt. Vit hava tveir nýggjar bátar í kappingini í ár. Umframt Klaksvíkingin hava vit fingið eitt nýtt 5–mannafar, sum eitur Tekla. Tað var eingin trupulleiki at fáa stuðlar at rinda prísin fyri bátarnar. Tað er ikki bara ein ábending um, men ein staðfesting av, at fólkið og fyritøkurnar her norðuri taka dyggiliga undir við okkum.

Og Kristian Eli Zachariasen sigur seg serliga fegnast um, at tað nú vísir seg, at heilt ung fólk so ast siga bjóða seg til at rógva:

– Vit kundu havt hugsað okkum, at tey vóru fleiri, sum hildu seg til, men undanfarnu árini hevur tað gingið eitt sindur striltið. Tað hava verið tey, sum hava gingið upp í róðurin og venjingina við lív og sál. Hini hava verið áhugað, men ikki so nógv, at tað hevur sást aftur í áhuganum fyri at manna bátarnar. Men hetta er broytt nú. Hesar seinastu dagarnar hava fleiri verið og spurt, um tey kunnu luttaka. Onkur manning fer at taka lut í ungdómsróðrinum, men tað tykist vera áhugi millum uppaftur fleiri. Skotbráðið gjørdist nakað stutt, tí tað var ikki fyrrenn í hesi vikuni, at onkur spurdu seg fyri. Vit vóna, at tey fara at taka lut í hinum stevnunum, sigur formaðurin í Klaksvíkar Róðrarfelag.

# Fleiri hundrað ferðast

**At Smyril ikki er tøkur kemur sera illa við hjá kappróðrarfólkunum, sum skulu á norðoyarstevnu í dag**

**KAPPRÓÐUR**
*Jóannes Hansen*

Fimm hundrað róðrarfólk skulu í dag taka lut í kappróðrinum á norðoyarstevnu. At tað eru so nógvir luttakarar setur stór krøv til stevnuna og stevnufyrireikararnar. Klaksvíkar Róðrarfelag borðreiðir fyri øllum í kantinuni hjá North Fish Cold Storie, har smyrjibreyð verður at fáa frá á middegi og inntil kappróðurin byrjar. Tað rokna teir ikki við verður nakar trupulleiki.

Mest áhugaverdi spurningurin er, hvussu tað fer at eydnast at koma til og úr Klaksvík. Smyril er í dokk. Tí skal Ternan flyta kappróðrarbátar úr Havnini og til Klaksvíkar. Bátarnir úr høvuðsstaðnum, Nólsoy og Suðuroy fara við Ternuni. Talan verður um átjan bátar. Bátarnir úr Vágum, Streymoy og Eysturoy fara við bilum til Leirvíkar og so við Dúgvuni tvørturum.

Stóri spurningurin verður, hvussu tað fer at spæla av, tá bátarnir skulu avstað aftur. Talið av ferðafólkum við Ternuni er avmarkað, tá sammett verður við Smyril. Tí fer ikki at bera til at føra øll tey, sum so við og við eru farin til Klaksvíkar, suður aftur við Ternuni tann túrin, tá kappróðrarbátarnir og flestu av manningunum fara suður.